# Nógv fólk til arbeiðis



Prix Føroyar er størsta tiltakið, sum hevur verið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, síðani tað lat upp í fjør.

Tiltakið kravdi nógv av húsinum, og eini 30 fólk vóru til arbeiðis fyri at røkja tær ymsu uppgávurnar í húsinum. Matur skuldi gerast til luttakararnar, vaktarhald skuldi vera í øllum rúmunum, fólk skuldu selja drykkivørur, og tøkningar skuldu syrgja fyri ljóði og ljósi.

– Tað er nógv at gera eitt slíkt kvøld, og tað er umráðandi at hava gott fólk á øllum plássum. Vit eru væl nøgd við hetta fyrsta Prixkvøldið, sigur Jonhard Hammer, leiðari í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

So nógv útgerð varð nýtt hetta kvøldið, at tað var gott, at teir í MC Hár ikki fóru undir brúsuna áðrenn framførsluna og skuldu føna hárið. So at siga hvørt elstikk var í brúk.

Tiltakið eydnaðist væl, ongar illstøður vóru, og fólk skikkaðu sær av fræggasta slag.

# Bjarnastein fylgdi við



Petur Magnus Bjarnastein er einasti føroyingurin, sum byggir gittarar. Leygarkvøldið var hann til Prixið, og hóast hann var komin fyri at lurta eftir tónleiki, hevði hann eisini eitt hálvt eyga og oyra við teimum gittarum, sum vórðu brúktir.

– Sjálvandi hyggi eg eftir, hvørjir gittarar verða brúktir, og stundum kann eg fáa okkurt hugskot eitt slíkt kvøld. Men tað er fyri tað mesta tey somu sløgini, sum ganga aftur, segði Petur Magnus Bjarnastein.

– Eingin av mínum gittarum var brúktur hesaferð, men Rói Christiansen í Déjá Vu brúkar ein Bjarnastein, og hann skal spæla komandi leygarkvøld, segði gittarbyggjarin.

Hann er júst liðugur við gittar nummar 17, og tann, sum Rói plagar at hava hangandi um herðarnar, er nummar 11 í røðini. Ein annar navnframur gittarspælari, sum hevur ein Bjarnastein, er Jens Marni Hansen.

– Eg havi áhuga fyri tónleiki, og tí eri eg komin meira fyri at uppliva hesar bólkarnar enn í arbeiðsørindum, segði Bjarnastein.

# Útvarpið beinleiðis



Útvarp Føroya verður ein virkin viðspælari í Prix Føroyum í ár. Teir fara at senda beinleiðis frá øllum umførunum í kappingini, og nógv verður gjørt burtur úr.

Umframt at framførslurnar hjá øllum bólkunum verða varpaðar beinleiðis út til allar føroyingar, eru prát við tónleikarar og áhoyrarar eisini partur av teimum fýra tímunum, sum sendingin varðar hvørt leygarkvøld.

Rúni Jákupsson og Bjarni Mohr eru vertir í sendingini, og teir halda til í einum serliga innrættaðum útvarpshølum á loftinum í Mentanarhúsinum. Í salinum hava teir Kára Sólstein at gera samrøður og greiða frá, og teir brúka eisini internet og sms í samskiftinum við lurtararnar.

# Prix-frítt ár

Mikkjal Hvannastein telist millum teir evnaríku gittarspælararnar í landinum, og leygarkvøldið var hann til fyrsta innleiðandi Prixumfarið.



Fyri tveimum árum síðani spældi hann í finaluni við I AM, men síðani er hann farin úr bólkinum.

– Í ár veri eg ikki við í Prix Føroyum. Eg eri í grundini ikki við í nøkrum bólki í løtuni, men eg venji og spæli nógv, og eg undirvísi eisini í gittarspæli, sigur Mikkjal, sum er búsitandi í Havn.

Í heyst var hann ein av tónleikarunum í bólkinum Kjølum, sum gjørdi eitt tíðaravmarkað comeback við nøkrum framførslum, men tað samstarvið skuldi ikki halda fram.

# Fróði væl nøgdur



Tað var einki at dylja yvir, at Fróði Vestergaard, sum er sentrali maðurin, tá ið tað snýr seg um Prix Føroyar, var nøgdur eftir fyrsta tiltakið. Tað sást á andlitinum hjá honum leygarkvøldið.

Hann hevur seinastu mánaðirnar stríðst við at fingið kabalina at ganga upp, og nú Prixið er farið av bakkstokki, kundi hann eisini fegnast um, at undirtøkan fyri tiltakinum var góð. Eini 600 fólk vóru til fyrstu kappingina.

Men enn er langur vegur á mál, tí fimm innleiðandi umfør og ein stór finala eru eftir at skipa fyri.

# Populerir fýrar



MC Hár dámar væl at arga. Yrkingarnar eru stundum á markinum til tað, sum nógv fólk hava hug at leggja oyra til, men hóast hetta – ella kanska júst tí – eru teir væl umtóktir millum ungfólk.

Hetta sást, tá ið teir fóru á pallin í Fuglafirði leygarkvøldið og vartraðu upp við sínum rapprocki. Tá ið teir vóru kosnir sum vinnarar á umfarinum varð leiðin løgd aftur á pallin, og tá vóru teir kanska enn betri móttiknir enn fyrru ferðina.

MC Hár spældi nakrar sangir fyri teimum kátu áhoyrarunum, áðrenn teir fóru av aftur pallinum fyri at njóta sigurin.

ítróttur

Nr. 18 • týsdagur • 28. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



*Hóast Ingi fyri fyrstu ferð í ár mátti taka til takkar við einum plássi á beinkinum, so tóktist hetta ikki at nerva føroyska Arsenal-leikaran nakað serligt*

# Ingi og Arsenal taptu

**Ingi Højsted kom inn í seinna hálvleiki og fekk einar tjúgu minuttir á vøllinum, tá U-17 liðið hjá Arsenal tapti 3-1 móti Tottenham leygardagin**

FÓTBÓLTUR

*orð & myndir: Heri á Rógvi*

**London:** Tað var ikki tað heilt stóra, Ingi Højsted kundi gera við ósigurin hjá liðnum hjá sær leygardagin.

Ingi fekk ikki meira enn einar tjúgu minuttir á vøllinum. Støðan var 2-1, tá Ingi kom á vøllin. Hóast hann luttók heilt fitt í spælinum, kundi hann lítið og einki gera við ósigurin hjá liðnum sær.

3-1 gjørdist endiliga støðan, og U17 liðið hjá Arsenal við føroyska Inga Højsted hevur nú tapt tríggjar dystir á rað.

## Leikliga javnt

Dysturin varð spældur á venjingarøkinum hjá Tottenham í Chigwell, Spurs Lodge, í útkantinum av London.

Dystir millum Tottenham og Arsenal eru vanliga nakað serligt. Talan er um tvey London lið, og ofta verður spælt um meira enn tey trý stigini.

Arsenal tóktiskt at hava gott tak á dystinum, men Tottenham fingu fyrsta stóra møguleikan. Miðskeiðis í hálvvleikinum hevði Arsenal yvirtakið, men Tottenham løgdu seg á odda.

Arsenal spældi við einari 4-4-2 uppstilling, meðan Tottenham spældi 3-5-2. Arsenal vóru langt frá nóg nærlagdir í álopspartinum.

Serliga í høgru álopssíðu spældi Tottenham seg til fleiri møguleikar, og tað var eisini herfrá, at fyrsta málið. Bólturin verður spældur skjótt fram í høgru, og innleggið verður lagt so væl fyri áleyparan, at hann kann annað enn skjóta bóltin í málið. 1-0 var eisini hálvleiksstø_an.

Seinni hálvleikur líkist nógv tí fyrra. Arsenal fekk javnað, men hetta helt sær ikki leingi. Triðja málið var eitt avbera vakur langskot frá einum av stóru talentunum hjá Tottenham.

Sum heild var dysturin javnur og rímiliga væl leiktur. Úrslitið kundi tað sama verið øðrvísi, men Arsenal hevði torført við at skipa sítt álopsspæl, og hetta gav at bíta.

## Á bonkinum

Føroyska íkastið til U17 fótbóltin í Onglandi, Ingi Højsted, var ikki millum teir útvaldu ellivu í byrjunaruppstillingini hjá Arsenal.

Hetta er fyrstu ferð í ár, at fyrrverandi B36 leikarin byrjar á bonkinum. Sjálvur sigur Ingi, at hann hevur havt ein lítlan skaða at dragast við.

– Vit royna oftani ymsar uppstillingar. Hesaferð valdi venjarin at geva onkrum, sum ikki hevur verið við hesum liðnum nakrar dystir, møguleikan, sigur Ingi Højsted.

Ingi var á vøllinum í góðar tjúgu minuttir. Hann kom tó ongantíð inn í dystin rættiliga, hóast hann sá rímiliga nógv til bóltin. Dysturin misti nógv seinastu løtuna, eftir at Tottenham hevði lagt seg á odda 3-1.

Hetta er triðja tapið hjá Arsenal á rað Arsenal liggur á triðja plássi í FA Academy League fyri U17 lið. Aston Villa er langt frá hinum liðunum.

Stigini og plaseringarnar eru kortini ikki so týdningarmikil, tí enn verður dystast í grundspælinum. Ì endaspælinum byrja øll lið av nýggjum. Tað er grundspælið, ið ger av, hvøri lið skulu spæla móti hvørjum øðrum, men í prinsippinum hava øll lið eins góðar møguleikar.



*Triðja dystin upp í slag mátti U-17 liðið hjá Arsenal taka til takkar við tapi. Tað er tó eingin vandi fyri, at teir ikki sleppa í endaspælið, og tá kann alt henda*